| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**21. mars 2013** | Blað nr.:<br>**10386** |
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **21. februar 2013** **kl. 16.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 28/13-57/13**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Bjørghild Djurhuus
Helena Dam á Neystabø
Sigrún Mohr
Tróndur Sigurdsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jan Christiansen
Jákup Dam
Andrea Heindriksdóttir

**LUTTÓKU IKKI:**
Sjúrður Olsen, ið er uttanlanda
Marin Katrina Frýdal, ið hevði forfall

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdóttir
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**31/13** **2013-0786**

**Sjúrður Olsen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jan Christiansen, eru loknar.

**Býráðið 21. mars 2013:** Samtykt.

**32/13** **2013-0786**

**Marin Katrina Frýdal hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Andrea Heindriksdóttir, eru loknar.

**Býráðið 21. mars 2013:** Samtykt.

**33/13** **2013-0175**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 21. mars 2013:** Tikið til eftirtektar.

**34/13** **2013-0143**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2013**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. februar 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. mars 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

**35/13** **2012-0454 KF**

**Ásetingar fyri neystaøkir í Nólsoy og framtíðar nýtslumøguleikar**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
**Nólsoyarnevndin 21. februar 2012:** Málið umrøtt. Umsitingin ger uppskot at umrøða við nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Verandi ásetingar fyri kap. IV, § 23, øki F: Neyst og bátapláss í byggisamtyktini fyri Nólsoy.

§ 23. Øki F: Neyst og bátapláss

1. Økið verður lagt av til neystabygging og pláss at seta bátar á.

2. Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd og ikki verða breiðari enn 4,0 m og hægri enn 4,5 m til mønuna, mált frá lægsta

jørðildi. Neyst skulu hava mønu, og hon skal verða í miðjuni, og takhallið skal vera 41,5 gradir. Bygdarráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, um serlig viðurskifti tala fyri tí.

3. Á bátaplássum er einans loyvt at gera bygningar, ið neyðugir eru til raksturin, t.d. amboðshús.

Endamálið við eini broyting av ásetingunum fyri øki F í byggisamtyktini fyri Nólsoy er, at neystini kunnu nýtast til onnur endamál enn bert neyst. Umsitingin metir, at tað er týdningarmikið at økið í minsta lagi verður nýtt lutvíst til neyst.

Í niðanfyri standandi uppskoti til ásetingar fyri øki F: og bátapláss, er loyvt at innrætta frítíðarhús uppi á loftinum í neystunum, meðan tað tó altíð er ein treyt, at bátur er í neystinum, tvs, at hetta verður varðveitt sum neyst, og kann bert inrættast til frítíðarhús, treytað av at bátur er í neystinum.

Víðari skulu ásetingar vera um útsjónd, so at eyðkenda neystabyggingin ikki hvørvur úr bygdamyndini. Hetta má arbeiðast neyvari við, men hetta skal sigast frá sum ein fortreyt fyri alt annað arbeiðið við at gera aðrar ásetingar enn verandi, fyri neysta økið.

Uppskot til nýggja § 23 í byggisamtyktini fyri Nólsoy.

§ 23. Øki F: Neyst og bátapláss

1. Økið verður lagt av til pláss at seta bátar á, og neystabygging, sum lutvíst kunnu innrættast til frítíðarhús.

2. Tað er ein treyt fyri at kunna innrætta neystið lutvíst til frítíðarhús, at bátur er til neystið, og innrættingin til uppihald, kann bert fara fram á loftinum við nøktandi rýmingarmøguleikum eftir galdandi reglum fyri hetta.

3. Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd og ikki verða breiðari enn 4,0 m og hægri enn 4,5 m til mønuna, mált frá lægsta jørðildi. Neyst skulu hava mønu, og hon skal verða í miðjuni, og takhallið skal vera 41,5 gradir. Bygdarráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, um serlig viðurskifti tala fyri tí.

4. Neyst, sum lutvíst verða innrættaði til frítíðarhús, skulu íbindast skipaða kloakk.

**Nólsoyarnevndin 29. mai 2012:** Nevndin setur spurning viðvíkjandi støddini av neystunum. Nevndin tekur undir við ætlanini, og borgarstjórin beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at taka undir við omanfyri nevndu broyting av byggisamtyktini fyri Nólsoy.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Ein meiriluti: Levi Mørk, Jákup Símun Simonsen og Bogi Andreasen samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jan Christiansen vísir til, at við verandi broyting ber als ikki til at innrætta neystini til partvís frítíðarhús og mælir til at umsitingin ger nýtt uppskot til §23 í byggisamtyktini, so at ætlanin við broytingini gevur meining.

**Býráðið 28. juni 2012:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Jákup Símun Simonsen, um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoti:**
Fleiri av neystunum eru breiðari enn 4 m og nøkur av óbygdu grundøkjunum til neyst eru eisini breiðari enn 4 m, tí metir býarskipanardeildin ikki at tað er neyðugt at halda fast við mest loyvdu breidd uppá 4 m.

Við at hækka mest loyvdu hædd við einum metri upp til 5,5 m og halda fast við takhallið uppá 41,5 gradir, er møguligt at fáa eina høga væðing í teimum smølu neystunum og harvið eitt rúmligt loft samstundis við at formurin av eyðkendu neystabyggingini verður varðveittur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at treytirnar um mest loyvdu breidd verða tiknar burtur úr ásetingunum og mest loyvda hædd verður hækka við einum metri soleiðis, at hæddin í mesta lagi kann verða 5,5 m, og at grein 23 tískil verður soljóðandi.

§ 23. Øki F: Neyst og bátapláss

1. Økið verður lagt av til pláss at seta bátar á, og neystabygging, sum lutvíst kunnu innrættast til frítíðarhús.

2. Tað er ein treyt fyri at kunna innrætta neystið lutvíst til frítíðarhús, at bátur er til neystið, og innrættingin til uppihald, kann bert fara fram á loftinum við nøktandi rýmingarmøguleikum eftir galdandi reglum fyri hetta.

3. Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd og ikki hægri enn 5,5 m til mønuna, mált frá lægsta jørðildi. Neyst skulu hava mønu, og hon skal verða í miðjuni, og takhallið skal vera 41,5 gradir. Býráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, um serlig viðurskifti tala fyri tí.

4. Neyst, sum lutvíst verða innrættaði til frítíðarhús, skulu íbindast skipaða kloakk, sum verður rindað av neystaeigarunum.

Somuleiðis verður mælt til at senda málið til unnælis í staðbundnu nevndini fyri Nólsoy, og í økisnevndina.

**Nólsoyarnevndin 26. februar 2013:** Tekniski stjórin greiddi frá nýggjum uppskoti, sum kemur fyri í teknisku nevnd 27.02.13. Nevndin hevði ikki viðmerkingar til uppskotið, sum varð lagt fram.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, við hesi broyting av pkt. 3:

3. Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd og nýttum lofti og ikki hægri enn 5,5 m til mønuna, mált frá lægsta jørðildi. Neyst skulu hava mønu, og hon skal verða í miðjuni, og takhallið skal vera 41,5 gradir. Býráðið kann tó víkja frá hesum ásetingum, um serlig viðurskifti tala fyri tí.

og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

- Nú kom Bogi Andreasen

**36/13** **2011-2216 KNN**

**Orkupolitikkur fyri Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at farið verður undir 3. stig í tilgongdini til eina virkissætlan fyri framtíðar orkuviðurskifti í kommunalum bygningum, metir umsitingin, at tørvur er á at seta ein arbeiðsbólk at taka sær av uppgávuni. Skotið verður upp, at fáa umboð fyri politisku skipanina og umsitingina í ein arbeiðsbólk, sum skal gera endamálsorðing í sambandi við orkupolitik fyri Tórshavnar kommunu. Eisini skal arbeiðsbólkurin gera uppskot til virkissætlan og verksetan av henni. Møguliga verður tørvur á uttanhýsis ráðgeving í sambandi við arbeiðið.

Verandi uppskot umfatar framtíðar orkuviðurskifti í kommunalum bygningum – bæði verandi og komandi bygningum. Spurningurin er, um kommunan skal víðka átakið til at fata um alla kommununa. Við hesum verður nátt heilt út til borgararnar. Støða ynskist verða tikin til um orku- klima málsetningurin eisini átti at umfata alla kommununa.

Í hesum sambandinum kann havast í huga visiónina fyri Tórshavnar kommunu, at høvuðsstaðurin verður ein vakstrardepil í Norðuratlantshavi, har kommunan m.a. vil *"at høvuðsstaðurin er burðardyggur búskaparliga, sosialt og umhvørvisliga* og Grøna skjalið, har kommuna m.a. vil leggja dent á at "*minka um orkunýtsluna, nýta minni av jarðbundnum (fossilum) orkukeldum og meira av alternativum orkukeldum",* og "*greina hvussu kommunalt virksemi kann skipast, soleiðis at kommunurnar ganga á odda viðvíkjandi orkusparing og minking av skaðiligum árini á umhvørvið*". Eisini er hetta eitt serstakt høvi til at fáa íverksett virðisorðini hjá kommuni - virðing, menning og trivnaður. Hetta í einum umhvørvissjónarhorni.

Á fundinum verður greitt frá nøkrum av átøkunum, sum eru sett í verk. Eisini verður lagt fram hvørjir málsetningar ymiskir býir hava sett sær.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til, at mannaður verður ein bólkur, við umboðum fyri politisku skipanina og umsitingina, at standa fyri at gera uppskot til endamálsorðing í sambandi við orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu at leggja fyri nevndina aftur til góðkenningar.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. september 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 20. oktober 2011:** Einmælt samtykt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa til tilmæli til fundin í heilsu- og umhvørvisnevndini 27. sept. 2011, og mæla til, at deildarleiðararnir fyri Húsaumsitingina, Byggideildina og Heilsu- og umhvørvisdeildina umboða fyrisitingina í bólkinum, og at býráðið tilnevnir 2 politisk umboð sambært §36 í kommunustýrislógini. Eitt starvsfólk úr fyrisitingini verður skrivari hjá bólkinum.

**Byggi- og býarskipnarnevndin 7. november2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Elin Lindenskov biður um málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at beina málið aftur í heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 22. november 2011:** Nevndin mælir býráðnum til, at bólkurin verður mannaður við einum umboði fyri húsaumsitingina, byggideildina og heilsu- og umhvørvisdeildina. Eitt starvsfólk úr fyrisitingini verður skrivari í bólkinum, og nevndin verður umboðað við trimum politiskum umboðum sambært §36 í kommunustýrislógini.

**Býráðið 24. november 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at velja Elin Lindenskov, Marin Katrina Frýdal og Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur gjørt uppskot til endamálsorðing í sambandi við orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla nevndini til at taka undir við uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum til endamálsorðing til orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, skjal nr. 2011-2216/13.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 11. desember 2012:** Nevndin samtykti at taka at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**37/13** **2013-0578 KF**

**Serstøk byggisamtykt fyri vindmyllur í Húsahaganum**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Tann 13. juli 2012 søkti SEV um loyvi til at seta 13 vindmyllur í Húsahaganum (mál nr. 2012-1750).

Økið, har ætlanin er at seta vindmyllurnar, liggur í 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Sambært almennu byggisamtyktini er 4. grundumráði í høvuðsheitum lagt út til landbúnað og alment frílendi og tílíkt. Tó er eisini loyvt, við eini serstakari byggisamtykt, at gera byggingar, sum eru neyðugar fyri alment gagnligar veitingar og staðseting av aðrari bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki í 4. grundumráði.

Í sambandi við uppseting av vindmyllum í Húsahaganum er gjørd ein serstøk byggisamtykt við skipan av økinum og treytum fyri bygging á økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri vindmyllur í Húsahaganum.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø og Bogi Andreasen vóru ikki við til hetta málið.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**38/13** **2012-2854**

**Val av einum limi í nevndina fyri barnamentanarheiðursløn ina**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært reglugerðina fyri nevndina er barnabókavørðurin á Býarbókasavninum fastur limur, ein limur er valdur av skúlabókavørðunum við kommunalu skúlarnar í Tórshavn, tveir limir valdir av Tórshavnar býráð og haraftrat er formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs fastur limur og er formaður í nevndini.

**Býráðið 29. november 2012:** Vald vórðu Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

**Ískoyti:**
Sambært grein 5 í reglugerðini fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs er formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs fastur limur og formaður í nevndini fyri barnamentanarheiðurslønina, og harumframt velur Tórshavnar býráð tveir limir í nevndina. Á býráðsfundi 29. november 2012 valdi býráðið Helenu Dam á Neystabø og Bjørg Dam í nevndina, men av tí at Helena Dam á Neystabø er formaður í mentamálanevndini og tískil fastur formaður í nevndini, eigur býráðið at velja ein nevndarlim aftrat.

**Býráðið 21. mars 2013:** Vald varð Sólrun Mikkelsen.

**39/13** **2012-2884**

**Val av limi í nevndina fyri Grunnin Tórsvøll fyri næstu 4 árini**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sambært viðtøkunum fyri grunnin, skal býráðið velja ein lim í nevndina, sum samstundis er formaður.

Nevndin situr í 4 ár, síðst býráðið valdi lim var í 2002.

**Býráðið 29. november 2012:** Valdir vóru Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 21. mars 2013:** Tikið av skrá.

**40/13** **2012-0631**

**Val av bygginevnd til Svimjihøllina til 50 metra hyl sambært §36 í kommunustýrislógini**

**Býráðið 29. mars 2012:** Valdir vórðu Jógvan Arge og Bogi Andreasen.

**Býráðið 21. mars 2013:** Vald vórðu Elin Lindenskov, Jógvan Arge og Bogi Andreasen.

**41/13** **2006-3283**

**Val av býráðslimum til bygginevnd fyri Brúnna um Sandá sambært § 36 í kommunustýrislógini**

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 14. desember 2011:** Valdir vórðu Levi Mørk og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 21. mars 2013:** Vald vórðu Marin Katrina Frýdal, Sjúrður Olsen og Sigrún Mohr.

**42/13** **2009-3106**

**Val av bygginevnd til Musikkskúlan sambært §36 í kommunustýrislógini**

**Býráðið 24. juni 2010:** Valdir vórðu valdir Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein.

**Býráðið 21. mars 2013:** Vald vórðu Helena Dam á Neystabø, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**43/13** **2012-1064**

**Val av býráðslimi í bygginevndina til at fyrireika bygging av nýggjum skúla sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 28. juni 2012:** Valdir vórðu Jógvan Arge og Jan Christiansen.

**Býráðið 21. mars 2013:** Vald vórðu Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Jákup Dam.

**44/13** **2013-0724**

**Undirskriftsreglur í sambandi við keyp og sølu av fastari ogn o.t.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Sambært § 44, 2, í lóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýrið - kommunustýrislógin - skulu skjøl í sambandi við keyp og sølu av fastari ogn o.t. verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess.

Harumframt er ásett í § 6, 1. petti í Kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu, at øll skjøl, ið binda kommununa, skulu undirskrivast av borgarstjóranum og einum persóni, sum býráðið hevur heimilað til tess.

Býráðið samtykti á fundi 5. november 2009 at kommunustjórin fekk heimild at undirskriva skjøl í binda kommununa.

**Tilmæli:**
Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til at fyrisitingarstjórin eisini fær heimild at undirskriva skjøl, ið binda kommununa, tá ið kommunustjórin er burturstaddur.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. mars 2013:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**45/13** **2012-1859 HSE**

**Umhvørvisstovan: Umsókn vegna Eyðfinn Andreas Olsen um samanlegging av matr. nr. 990r og 990s, Tórshavn**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Eyðfinnur A. Olsen søkir um loyvi at samanleggja matr. nr. 990r og 990s, við Velbastaðvegin, umframt at keypa ein part av kommunala økinum sum er lagt út til veg.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðispartinum A1 á almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu,

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Matr. nr. 990r er 469m² til víddar, og matr. nr. 990s er 787 m² til víddar.

Parturin av vegnum sum ynskist til keyps er 48 m².
Eigarin av matr. nr. 990r og 990s er Mads Berg Petersen og fl. Eyðfinn A. Olsen hevur gjørt eitt treytað skeyti um keyp av ognunum við eigaran.

**Frávik:**
Umsóknin inniber fylgjandi frávik:
At útstykkingarætlanin skal broytast.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarligt:**
Onga fíggjarliga binding fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Ongar viðmerkingar

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Ongar viðmerkingar

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j.nr. 2012-1859

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin av byggideildini mæla frá at ganga umsóknini á møti, vísandi til at umsóknin ikki kemur frá eigaranum av ognunum sum skulu leggjast saman, og at umsóknin krevur at útstykkingarætlanin fyri økið verður broytt. Somuleiðis er talan um at keypa burturav vegaatkomuni til útstykkingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** Nevndin er sinnað at ganga umsóknini á møti, treytað av, at tað verður tinglisið á samanlagda stykkið, at bert eini sethús kunnu byggjast á stykkið, og av góðkenning í teknisku nevnd viðvíkjandi útkoyring á Velbastaðvegin og av góðkenning í fíggjarnevndina viðvíkjandi keyp av tí partinum sum liggur sum vegur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir frá at ganga umsóknini á møti, av tí at broytingin viðførir, at innkoyringar tá koma at verða beinleiðis frá Velbastaðvegnum. Ásannandi, at atkomuvegurin til fyriliggjandi útstykkingarætlan viðførir stóra uppfylling, og at tískil kunnu verða góðar grundir fyri at broyta útstykkingarætlanina, verður í staðin mælt til, at eigarin letur inn nýggja útstykkingarætlan, har atkomuvegur til verandi sethús og nýggju grundstykkini verður loystur á nøktandi hátt.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2012:** Nevndin samtykti at loyva einari útkoyring til Velbastaðvegin frá útstykkingini og beinir málið í fíggjarnevndina.

Maria Hammer Olsen var ikki við til hetta málið.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd, til ein endalig loysn er funnin á atkomu – og útstykkingarviðurskiftunum.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við umsøkjaran og hevur somuleiðis verið og kannað umstøðurnar á staðnum. Umsøkjarin hevur eisini sjálvur tosað við núverandi eigarar av ognunum 990p, 990q, 990r og 990s. Eigararnir eru ikki áhugaðir í at gera nakra felags vegaloysn fyri útstykkingina, men ynskja bert at selja matr. nr. 990r og 990s. Eigararnir siga seg heldur ikki hava tørv á vegaatkomu til matr. nr. 990p, tí tey eru búsitandi í Danmark og nýta einans húsini til summarhús.

Umsitingin hevur áður víst á, at atkomuvegurin til fyriliggjandi útstykking viðførir stóra uppfylling, og at tískil kunnu verða góðar grundir fyri at broyta útstykkingina og vegaatkomuna, men hesum er eigarin sum nevnt ikki áhugaður í.

Ein loysn á málinum kann tí verða at tinglýsa avmarking á teir tríggjar matriklarnar, matr. nr. 990p, 990r og 990s, sum verða ávirkaðir í samband við hetta mál.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at ganga umsóknini um samanlegging av matr. nr. 990r og 990s á møti treytað av at eigararnir binda seg til fylgjandi servituttir verða tinglýstar á ognirnar matr. nr. 990p, 990r og 990s:

<u>Matr. nr. 990p:</u>
- Ognin kann ikki sundurbýtast í fleiri lutir.
- Ongin um-, út- ella nýbygging av nøkrum slag kann gerast á ognini, fyrrenn eigarin hevur gjørt nøktandi atkomu til akfør, soleiðis at ásetingarnar í byggisamtyktini um parkeringspláss á ognini verða hildnar.

<u>Samanlagda ognin (matr. nr. 990r og 990s):</u>
- Ognin kann ikki sundurbýtast aftur í fleiri lutir.
- Einans eini sethús kunnu byggjast á samanløgdu ognini.
- Ognin kann bert hava eina atkomu frá almennum vegi.
- Um atkomuvegur seinni verður gjørdur millum matr. nr. 990p og 990q, kann kommunan krevja íbindingina í Velbastaðvegin stongda, og at atkoma tá verður frá vegnum millum matr. nr. 990p og 990q.
- Ongin um-, út- ella nýbygging av nøkrum slag kann gerast á ognini, fyrrenn eigarin hevur gjørt nøktandi atkomu til akfør, soleiðis at ásetingarnar í byggisamtyktini um parkeringspláss á ognini verða hildnar.

Harumframt verður mælt til at seta sum treyt fyri at selja umsøkjaranum part av verandi vendiplássinum, at hann útvegar tilsvarandi økið burturav matr. nr. 990p og 990q, og letur kommununi hetta í staðin, soleiðis at vendipláss við kravdari stødd kann gerast á staðnum.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena D. á Neystabø var ikki við til hetta málið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**46/13** **2005-1183**

**Reinsaríið í Tórsgøtu**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til undanfarna samtykt í málinum, har játtaðar eru kr. 450.000 til kanningar og ráðgeving at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu, hevur arbeiðið higartil leitt fram til, at mælt verður til at broyta leist fyri hetta arbeiðið.

Orsøkin er, at kanningarnar av bygninginum hava víst, at umvælingararbeiðið í stóran mun best kann skipast sum smáar einkult standandi arbeiðstøkur, sum noyðast at fremjast í stigum fyri at kunna taka støðu til, hvussu farast skal víðari fram. Hetta er serstakliga grundað á, at talan er um ein gamlan bygning, sum fyrst hevur havt nógva og skiftandi nýtslu, og síðan hevur staðið tómur. Hetta hevur havt sína ávirkan á týðandi bygningslutir, og neyðugt er sostatt at bróta niður partar fyri at fáa eina hylling á, hvussu farast skal víðari fram.

Tá talan er um slíkt arbeiði, sum nærum kann samanberast við restaureringsarbeiði, verður ofta mett, at tað er sera óheppið at binda seg til eina høvuðsentreprisu í sáttmála. Vandi er fyri at koma í ta støðu, at eitt av arbeiðinum avdúkar so týðandi trupulleikar, at neyðugt kann verða við munandi fleiri pengum fyri at fremja lidnu loysnina eftir avtaluni, sum er sáttmálabundin. Og tá hevur byggiharrin ringar møguleikar at annaðhvørt steðga á ella skifta loysn uttan stórar eykakostnaðir.

Skotið verður tí upp at brúka annan leist, at samlaða íløgujáttanin, ið eftir er kr. 1.050.000, verður játtað til verkætlanina, og at bjóða arbeiðið út í smærri arbeiðstøkur sum undirhondsboð, so hvørt sum ein arbeiðstøka er avklárað.

Kostnaðarmeting fyri fyrsta umbyggingarstig verður løgd fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.050.000 av kontu 5376, L53002 Reinsaríið stigvis umbygging, og at einstøku arbeiðstøkurnar verður bodnar út sum undirhondsboð.

**Mentamálanevndin 9. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi við Tórshavnar kommunu 16. november 2011 vísti Felagið MenTón á vantandi tónleikaumstøður í Havn, og ynski varð sett fram um, at Reinsaríið í Tórsgøtu verður spælistað. Teirra meting er, at tann núverandi ætlanin ikki er nøktandi til teirra virksemi. Í hesum sambandi er neyðugt at kanna, um til ber at laga verkætlanina til tørvin hjá tónleikarunum, herundir ljóðviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 75.000 av kontu 5366 Stuðul annars til at kanna, hvussu bygningurin best verður lagaður til tørvin hjá tónleikinum.

**Mentamálanevndin 30. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Mikael Viderø, býararkitektur, varð biðin um at kanna um Reinsaríið eisini kann brúkast til rytmiskt spælistað.

Kontrast Arkitektar hevur gjørt nýtt uppskot av Reinsarínum.

Í nýggja uppskotinum, januar 2012, verður m.a. sagt:

“ Reinsaríið verður í dag eina mest nýtt til konsertir. Uppruna uppskotið var, at húsið skuldi nýtast til fleiri ymisk endamál, til tónleikaframførslur, almen tiltøk, bókakafe, uppihaldsstað fyri ungdómar á útferð, herundir dag- og frítíðarstovnar. Tað hevur verið eitt ynski, at broyta ætlanina, soleiðis at møguleiki er at brúka húsið til rytmiskt spælistað. Tískil eru ávísar broytingar gjørdar í mun til fyrra uppskotið. Meira luft er nú millum hæddirnar fyri at økja um rúmd (volumen). Men annars er tankin tann sami, við einum gjøgnumgangandi multifunktionaliteti.

Byggilistarliga hugskotið byggir uppá, at samantvinna tað gamla við nakað nýtt. Innan verður tað gamla varðveitt, sum er merkisvert í sær sjálvum, og við nýggjari innrætting og nútíðar sniði fæst ein meira tíðarhóskandi og nýtiligur bygningur. Hugskotið byggir eisini uppá at fáa ein polyvalentan bygning, sum við sínum mongu tiltøkum kann broyta funktión eftir tørvi. Hetta, at hava rúmini so opin sum møguligt og funktiónirnar mobilar. Rýmingartrappa í norðurskjøldrinum er eisini hugsað sum brúkstrappa.

Veghæddin skal kunna nýtast til rytmiskan tónleik, men eisini er møguleiki fyri øðrum framførslum. Pallurin verður í vestursíðuni á fyrstu hædd, við sitiplássum kring pallin, samstundis sum sitipláss verða kring opið á aðru hædd."

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at arbeiða víðari eftir uppskotinum frá januar 2012, til eisini at gera Reinsaríið til eitt rytmiskt spælistað og samstundis varðveita multifunktionalitetin.

Á íløguætlanini 2012 konto 5375 eru avsettar 1 mió. kr.

Mælt verður til at játta 1 mió. kr. av íløgum 2012 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Mentamálanevndin 11. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina partin um peningajáttina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1 mió. av íløguætlanini 2012 konto 5375 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Ískoyti:**
Samsvarandi viðmerkingum frá húsaumsitingini og byggideildini hevur Kontrast tillagað uppskotið frá januar 2012, har dentur varð lagdur á at fáa viðurskifti í lagi í sambandi við bruna, funktión, kloakk, umhvørvi, trygd, lyftu, rørslutarnað o.a.

Gjørd er tí nýggj kostnaðarmeting, har samlaði kostnaðurin nú er mettur til 6,8 mió. kr. við mvg.

Ætlanin hevur verið at gera arbeiðið í stigum og í fyrsta umfari at fremja kjallarahæddina og miðhæddina. Hesin partur er mettur at kosta 3,5 mió kr. við mvg.

Á kontu 5375 L53002 eru 2,1 mió kr. tøkar til endamálið. Á íløguætlanini fyri 2013 konta 5375 eru avsettar 3 mió kr. aftrat.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 3 mió. kr. av íløgukontu 5375 til kontu 5375 L53002 Reinsaríið til at arbeiða víðari við liðugtgerðini.

**Mentamálanevndin 27. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og harumframt til at mæla býráðnum til at játta 2 mió. kr. afturat til liðugtgerð, ið verður at fíggja soleiðis: kr. 1.660.000 av konto 5375 Skálatrøð og kr. 340.000 av konto 5175 Musikkskúlin. Játtanin upp á 2 mió. kr. til liðugtgerð er treytað av undirtøku frá mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 20. mars 2013:** Samtykt at taka undir við fíggjarnevndar-samtyktini 13. mars 2013.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**47/13** **<u>2013-0506 HN</u>**

**<u>Gongubreytir á Frælsinum breiðkast til gongu- og súkklubreytir</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við ynski um súkklubreytir í kommununi, verða gongubreytirnar á Frælsinum uppstigaðar til gongu- og súkklubreytir, sambært tekning 2013-0506/2.

**Fíggjarligt:**
Arbeiðið er mett at kosta kr. 1.000.000,- íroknað 6,25% mvg. Sí annars j. nr.: 2012-0506/3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at:

1. farið verður undir at gera omanfyri standandi arbeiðir, fíggjað av íløgum 2013, deild 8175, súkklubreytir,
2. játtað avsettu kr. 1,0 mió. til endamálið
3. beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. mars 2013:** Tikið av skrá.

**48/13** **2008-1294 (sí eisini j. nr. 2005-2344) EY**

**Nevndarsamtykt: Dagføring av Sundsvegnum frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ráðgevingarfyritøkan Rambøll Nyvig hevur gjørt eina ferðslugreining í sambandi við nýggja Innkomuvegin til Havnar, sí j. nr. 2008-1292/1. Í framtíðini verður ársdøgnmiðalferðslan eftir Sundsvegnum umleið 18.000 akfør.

Tekniska fyrisitingin er komin til ta niðurstøðu á innanhýsis fundi, at tað er neyðugt at dagføra verandi vegastrekki frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar. Víst verður til kort av verandi Sundsvegi, sí j. nr. 2008-1293/1.

Neyðugt er at biðja ráðgevingarfyritøku gera eitt dispositiónsuppskot av eini dagførdari linjuføring av Sundsvegnum. Eitt tílíkt uppskot er mett at kosta umleið kr. 500.000,-.

Í hesum sambandi fer umsitingin at heita á teknisku nevnd, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, at játta neyðuga peningin til endamálið.

Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi
1. Játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot
2. Skal projekteringsarbeiðið bjóðast út?

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot umvegis fíggjarnevndina og býráðið, og at bjóða projekteringsarbeiðið út til fleiri ráðgevar.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at fíggingin verður játtað av íløgum í 2008.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at flyta kr. 500.000,00 av íløgujáttanini til gøtu til Hvítanes.

**Býráðið 26. mai 2008:** Atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.
Ímóti atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Anfinn Brekkstein.

Greiddu ikki atkvøðu: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Jan Christiansen,

- Fyri at fáa fatur á lendinum til ætlaðu rundkoyring er neyðugt at fáa fíggingina tøka skjótast gjørligt. Í staðin fyri at halda á við projekteringini sambært ávístari játtan í býráðnum 26.05.08 (smb j. Nr. 2008-1294), verður í staðin fyri mett betur, at peningur verður játtaður til keyp av lendi. Samlaði kostnaðurin fyri at fáa útvegað lendi til rundkoyringina er uml. kr. 650.000,-.

**Tilmæli:**
Vísandi til at Føroya Løgting ikki hevur sett pening av til íløgur í innkomuvegin til Havnar, er projektið til dagføring av Sundsvegnum ikki so átroðkandi sum upprunaliga. Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heita á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, at játta restupphæddina av játtaðu kr. 500.000,- frá 26.05.2008, sum er áljóðandi 385.116,- pr. 1. februar 2009, til mál nr. 2005-2344 til keyp av lendi.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanum at byggja tónlistarskúla á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið, skal støða takast til um ikki Sundsvegurin skal dagførast til væntandi øktu ferðsluna, ið fer at verða við íbindingina til Sundsvegin. Samstundis skal støða eisini takast til um ikki fjarhitaleiðing skal leggjast frá Berjabrekku at knýta til tónlistarkúlan, mgl. svimjihøllina, Norðurlandahúsið og Gundadalsøkið.

Sum støðan er í dag, eru uml. 800 húski í Hoyvíkshaganum knýtt at fjahitafelagnum, sum fær ókeypis orku frá kommunalu brennistøðini. Umleið 40% av samlaða orkuframleiðsluni verður ikki gagnnýtt, og tískil skuldi verið rúm fyri at veitt orku til Norðurlandahúsið, komandi tónlistarskúla umframt alt Gundadalsøkið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at nevndin, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, raðfestir avseting av kr. 400.000,- til at gera skitsuuppskot við útgreinan av kostnaði fyri dagføring av Sundsvegnum við atliti til at leggja nýggjar fjarhitaleiðingar til Norðurlandahúsið, komandi tónlistarskúla umframt alt Gundadalsøkið, á íløguætlanini fyri 2012.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Sjúrður Olsen luttók ikki.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Settar eru 2 mió. kr. av til dagføring av Sundsvegnum fyri fíggjarárið 2012 (§6 konto 8175).

**Tilmæli:**
Vísandi til býráðssamtykt frá 8. sept. 2011 um at raðfesta kr. 400.000,- til at gera skitsuuppskot, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini til at játta kr. 400.000,- av íløgum fyri 2012 (§6, kto. 8175) til projektering av skitsuuppskoti við kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta kr. 400.000 av íløgum fyri 2012 av konto 8175 til projektering av skitsuuppskoti og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Jákup Símun Simonsen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli. Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, latið gera uppskot til linjuføring av Sundsvegnum. Talan er um 2 ymisk uppskot á strekkinum millum vegamótið Gæsugøta/Sundsvegur og rundkoyringina við Norðara Ringveg.

Ráðgevin kemur á fundin at leggja fram og greiða frá fyrimunum og vansum viðvíkjandi uppskotunum.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við linjuføringini í framlagda uppskotinum frá Verkfrøðingastovuni, TK, Sundsvegur S, VFS 06.07.2012 og at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.
Nevndin samtykti eisini at beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðið 13. september 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Nú tað røkist fyri at ætlaðu broytingarnar í byggisamtyktini fram við Sundsvegnum fáa gildi í næstum, ætlar fyrisitingin at fara undir eina kunningar/samskiftis/samráðingar tilgongd við matrikulánararnar fram við Sundsvegnum, um skipan av vegatkomum og lendinum fram við vegnum, sum eisini kann gerast útgangsstøði fyri serstøkum byggisamtyktum fram við vegnum.
Í hesum sambandi hevur fyrisitingin heitt á Verkfrøðingastovuna um at lata kommununi tilboð uppá at gera longdarskurð í linjuføringina, sum tekniska nevnd hevur samtykt at taka undir við, og at gera tvørskurð í komandi vegin og tún, sum lýsir atkomuviðurskiftini frá verandi vegi og frá lidna vegnum hjá einstøku matrikulánarunum, fram við dagførda vegnum.
Verkfrøðingastovan sigur seg kunna átaka sær at lýsa nevndu atkomuviðurskifti og gera nevnda longdarskurð í góðkendu linjuføringina fyri kr. 236.000,- excl. MVG (sí j. nr. 2012-0370/25), ella kr. 250.750,- tá 6,25% MVG er íroknað.

Av teimum kr. 400.000,-, sum býráðið hin 14. desember 2011 samtykti at játta av íløgum fyri 2012 av konto 8175 til projektering av skitsuuppskoti, eru kr. 151.615,- ikki nýttar og íresta sostatt kr. 99.135,- fyri at kunna taka av omanfyri nevnda tilboði frá Verkfrøðingastovuni.

Eisini arbeiðir fyrisitingin við at skipa og samskipa parkering, atkomur og ferðslu fyri ávikavist ætlaða musikkskúlaøkið og grannamatriklum.

Verkfrøðingastovan hevur mett um samlaða kostnaðin til 21,3 mió. excl. MVG (sí j. nr. 2012-0370/25), fyri at dagføra teir 562 metrarnar av Sundsvegnum, millum verandi innkoyring til rennibreytina og niðan til bakaríið Mylnan, har kostnaðurin fyri fjarhita og serstakar matrikulloysnir ikki er íroknaður. Hetta svarar til ein mettan kostnað á umleið kr. 37.900,-, excl. MVG, fyri hvønn metur av dagførdum vegi.
Kostnaðarmetingin frá Verkfrøðingastovuni er gjørd við fyrivarni fyri hvussu verandi fylla í vegnum er skikkað, nøgd av hellu at spreingja v.m. og er somuleiðis treytað av at vegurin er stongdur fyri gjøgnumferðslu, meðan arbeiðið fer fram.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Fyri at sleppa undir at gera projektuppskot sambært omanfyri standandi, er neyðugt at fáa játtað kr. 100.000,- av markaðum íløgum fyri vegir í 2013 – álj. 6 mió. kr. Eftirfylgjandi gerð av høvuðsprosjekti er fyribils mett til kr. 1.000.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 1.100.000,- av íløgum fyri 2013 (§6, kto. 8175) soleiðis at farast kann undir at gera projekt-uppskot og síðani, tá prosjektuppskotið er góðkent, at gera høvuðsprosjekt, og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið. Somuleiðis verður mælt til at restin av avsettu upphæddini á fíggjarætlanini fyri 2013 - 4,9 mió. verður standandi til írestandi fígging verður tøk til at fremja verkætlanina, eins og mælt verður til at tekniska

nevnd, fíggjarnevndin og býráðið taka støðu til raðfesting av mettu írestandi upphædd á. uml. 13,3 mió. á langtíðar íløguætlan kommununar.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**49/13** **2006-0527 KNN**

**Reglugerð fyri tøming av rottanga og spillvatnsreinsiverki í Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við § 2 í kunngerð nr. 186 frá 5. november 1993 skal kommunustýrið gera eina ætlan fyri tøming og burturbeining av spillvatnsevju í kommununi herundir ásetingar um hvussu ofta tømt verður. Við støði í m.a. hesi grein hevur kommunan gjørt eitt uppskot til eina reglugerð fyri tøming av rottangum og spillvatnsreinsiverkum í Tórshavnar kommuna.

Støða skal verða tikin til, um heilsu- og umhvørvisnevndin kann samtykkja uppskotið til reglugerðina.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at heilsu- og umhvørvisnevndin samtykkir uppskotið til reglugerðina.

Fyrisitingin hevur gjørt eitt uppskot um hvussu gjaldast skal fyri tøming av rottangum og spillvatnsreinsiverkum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at heilsu- og umhvørvisnevndin samtykkir uppskotið til áseting av reglum fyri gjalding og prís fyri tøming.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 10. mai 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

Umsitingin leggur endaligt uppskot til reglugerð fyri nevndina aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Støða skal verða tikin til, um heilsu- og umhvørvisnevndin kann samtykkja uppskotið til reglugerðina og beina tað til endaliga viðgerð í býráðnum umvegis fíggjarnevndina.

Støða skal samstundis verða tikin til, um heilsu- og umhvørvisnevndin kann samtykkja tað fyrisitingarliga uppskotið til hvussu gjaldast skal fyri tøming av rottangum og spillvatnsreinsiverkum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at heilsu- og umhvørvisnevndin samtykkir uppskotið til reglugerðina og uppskotið til áseting av reglum fyri gjalding og prís fyri tøming, soleiðis at tað samlaða málið kann beinast víðari til endaliga viðgerð í býráðnum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 8. juni 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

Fíggjarnevndin 21. juni 2006: Leiðarin fyri kommunalu brennistøðina og býarverkfrøðingurin greiddu frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

Býráðið 29. juni 2006: Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Ískoyti:
Reglugerðin er dagførd, endurskoðað og orðingin er einfaldari. Í høvuðsheitum eru broytingarnar, sum niðanfyristandandi:
- Nærri er greina út, at privatborgarar gjalda einki fyri fyrstu tøming, og at øll onnur gjalda eitt gjald hvørja ferð tømt verður,
- skrásetingina av upplýsingum í telduskipanini er tillagað, og
- Heilsufrøðiliga starvsstovan er broytt til Umhvørvisstovan.

Í verandi rottangaskipan er bert møguleiki at senda rokning til virkir o.o, sum hava egnan rottanga, og ikki til virkir, stovnar, feløg v.m. sum eru knýtt í felags ”reinsiverk”. Orsøkin til hetta er, at eingin skráseting av hvørji virkir/stovnar eru knýtt í einstøku reinsiverkini finst, og at eingin útrokningarlykil er samtyktur fyri hvussu gjaldið skal ásetast til hesi og viðførir hetta, at ójavnvág er í gjøldum millum ymisk virkir/stovnar, t.v.s. at summi gjalda fyri hesa tænastu, meðan onnur einki gjalda.

Upplýsast skal, at ein stórur partur av virkjum, stovnum og feløgum eru knýtt at einum reinsiverki og fáa hesi onga rokning fyri rottangatøming. Mett verður, at um kostnaðarskipanin var fullfíggjað, vildi rottangaskipanin viðført eina meirinntøku á umleið kr. 4-500.000 árliga.

Fyri at skapa javnvág viðv. gjøldum er neyðugt at gera eina gjaldsskipan, sum tekur hædd fyri øllum, sum reglugerðin um rottangatøming fata um.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini og leiðarin á kommunalu brennistøðini mæla til at taka undir við broyttu reglugerðini og at heimila umsitingini at gera uppskot til gjaldsskipan, sum fatar um øll sum skulu gjalda fyri rottangatøming, at leggja fyri nevnd.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**50/13** **2012-2383 (sí eisini j.nr. 2012-0028) HH**

**Matr. nr. 1406a, Tórshavn. Tinglýstur eigari: Kartni Winther**

Trøðin er til víddar 15.859 harav veglutur 317 m². (Tinglýst ognarveðbræv til Eik Banka kr. 1,5 mill. kr.)

Árni og Mads A. Winther bjóða kommununi helmingin av trøðni til keyps fyri 1,2 mill. kr. (svarandi til kr. 151,33 m²).

Teir umhugsa eisini møguleikan at selja trøðna, antin í fríðari sølu ella til Tórshavnar kommunu fyri metingarvirði 2,4 mill. kr.

Árni Winther, ynskir tó heldur at selja eystara helmingin av trøðni, sum er móti ánni til kommununa, soleiðis at hann kann hava hin helmingin eftir.

Kommunan kann fáa tinglýstan forkeypsrætt í partinum hjá Árna Winther.

Alfred Petersen, advokatur, hevur 5. juli 2012 virðismett trøðna til 2,4 mill. kr. svarandi til 151,33 kr. m².

Sambært Búnaðarstovuni er fermeturprísurin fyri velt lendi og væl dyrkingarbært lendi, sum liggur væl fyri í Tórshavn 143,60 kr. m²(íroknað endurgjald fyri mist bit og endurgjald fyri mista fóðurframleiðslu).

Kommunan arbeiðir saman við landinum, um at skapa eitt stórt samanhangandi nátturuøki líka frá Boðanesgjógv og niðan í Villingardal. Matr. nr. 1406a, liggur inni á hesum øki.

**Tilmæli:**
Leiðarin á starvs- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskpanarnevndina.

**Ískoyti:**
Lendisdeildin og býarskipanardeildin viðmæla, at kommunan ognar sær lendið, eystara helmingin av trøðni, sum er móti ánni, sum er ein tíðandi partur av samlaða frílendisøkinum.

Víst verður eisini til fundarfrásøgn frá 1. oktober 2012 í Ráðhúsinum j.nr. 2012-2383/2.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til at keypa tann niðara partin móti ánni, sum er umleið 4.600 fermetrar til støddar og at eitt møguligt keyp er treytað av at kommunan fær loyvi til at leggja kloakk i vestara part av trøðni (samb. mál nr. 2012-0028), og beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

Helena Dam á Neystabø og Bogi Andreasen vóru ikki við til hetta málið

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**51/13** **2013-0562 MSH**

**Útleiðingar út á Sjógv frá Sandvíkarhjalla og Yviri við Strond (Eystfalssker-Válgaravík-Kommandørhúsunum)**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá kommununi, er ætlanin at fara undir at gera arbeiðið liðugt at leiða kloakkirnar frá Sandvíkarhjalla og Yviri við Strond út á sjógv. Talan er um arbeiði á økinum við Eystfalssker, Válgaravík og undir Komandørhúsunum og út á streymasjógv.

Arbeiðini fara at fevna um at dagføra verandi útleiðingar, so at hesar framyvir lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni við at leiðingarnar koma út minst 1 m undir størstu fjøru.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða arbeiðið er mett at kosta kr. 2.500.000,- og er ynski um at fáa heimild at gera útbjóðingartilfar, bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og leggja fyri nevnd aftaná. Ætlanin er at arbeiðið skal byrja í vár.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2013 er 5,7 mió. kr. og er ætlanin at nýta 2,5 mió. kr. til dagføring av útleiðingunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta kr. 2.500.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**52/13** **2013-0563 MSH**

**Kloakk við Hoyvík/Hoydalar**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá kommununi, er ætlanin at fara undir gera arbeiðið liðugt at samla kloakkirnar í Hoydølum. Talan er um at skipa kloakkleiðing úr Hoyvík, herundir partar í 'Gamla býarpartinum' í Hoyvík og leiða tær út á streymasjógv.

Arbeiðið fer at fevna um at savna kloakkirnar frá Garðavegnum, Gamlaveg og 'Gomlu Hoyvíkini' og leiða kloakkina í verandi útleiðing á Boðanesi.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða arbeiðið er mett at kosta kr. 2.500.000,- og er ynski um at fáa heimild at gera útbjóðingartilfar, bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og leggja fyri nevnd aftaná. Ætlanin er at arbeiðið skal byrja í vár.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2013 er 5,7 mió. kr. og er ætlanin at nýta 2,5 mió. kr. til dagføring av útleiðingunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta kr. 2.500.000,- av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**53/13** **2013-0565 MSH/JSJ/BH (sí eisini mál nr. 2010-2190)**

**Arbeiði at dagføra kloakkir í Tórshavnar kommmunu sambært góðkendari spillivatnsætlan til 2015**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna skal innan 2015 gera ávís kloakkarbeiði, so at kloakkirnar lúka minstukrøvini, ið eru ásett í spillivatnsætlanini sambært kungerð nr. 111 frá

7. september 2009, sum býráðið 1. november 2012 hevur samtykt (sí mál nr. 2010-2190).

Ætlanin fevnir sum kunnugt um:
1. Lýsing av spillivatnsskipanini, íroknað bygnað, tilfar, aldur, reinsing og kloakkeringsøkið
2. Slag og nøgd av spillivatni, ið verður og fer at verða leitt gjøgnum leiðingarnar
3. Útleiðingarstøð og umhvørvi rundanum, t.d. botn- og vatngóðsku og streymviðurskifti
4. Ampar og umhvørvisárin frá skipanini og útleiðingini
5. Eftirlit og røkt av spillivatnsskipanini
6. Meting um væntaða menning í kommununi hvat fólkatali og ídnaðartilgongd viðvíkur, og hvønn týdning menningin hevur fyri samansetingina og nøgdina av spillivatni, og fyri umhvørvið, ið spillivatnið verður leitt út í
7. Grundgivna raðfesting av nær ætlaða kloakkeringsarbeiðið verður framt, og nær tað væntandi verður liðugt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Grundað á fyribils metingar hevur umsitingin mælt til at raðfesta arbeiðini í nevndu spillivatnsætlan soleiðis, at játtanin var í hesi raðfylgju í 2012: 7,5 mió., í 2013: 7,5 mió. og í 2014: 4,1 mió.

Spillivatnsætlanin fevnir um dagføring av kloakkum í umleið 20 ymsum støðum í allari kommununi og fyri at fáa útgreinað ítøkiligari hvussu fíggjartørvurin fyri hesi arbeiði fer at verða, er ætlanin at fara undir miðvísa projektering av kloakkarbeiðunum í nøkrum av hesum støðum. Eftirfylgjandi verður farið undir tilgongd at fáa fígging til at fremja nevndu kloakkarbeiði.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2013 er 5,7 mió. kr. og ynskir umsitingin við hesum at fáa loyvi at bjóða serstøk økið út til ráðgevandi virki at gera skitsuprosjekt og kostnaðarmeting av ávísum økjum, sum umsitingin vísir á.
Talan er um niðanfyri standandi øki:

1. <u>**Kloakkir í Kollafirði**</u>
   Fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni, er ætlanin at gera arbeiðið liðugt at savna allar kloakkir í Kollafirði, Kollfjarðardali og Hundsarabotni í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Miðað verður eftir at savna so nógvar útleiðingar saman sum møguligt, áðrenn tær verða leiddar út á sjógv minst 1 m undir størstu fjøru. Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørdur, talan er um Norðuri í Sundinum í Líðini og á Oyrareingjum.

2. <u>**Kloakkir í Kaldbak og Kaldbaksbotni**</u>
   Ætlanin er at samla allar kloakkir í Kaldbak í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørt, við Á er útleiðing lóglig. Inn á Gørðum og inni á Fløtum er kloakkin leidd í skipaðar leiðingar.

3. **Kloakkir við Bakkagøtu og á Argjaboða á Argjum**
Ætlanin er framhaldandi at samla kloakkirnar á Argjum í skipaða leiðing og út á sjógv fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni. Talan er um kloakkútleiðingar við Bakkagøtu og Argjaboða

Partur av arbeiðinum at fylgja krøvinum fá Umhvørvisstovuni er longu gjørt, við Sjósavnið, við Bátahylin og frá kloakkini frá Kongavarða/Hamrinum.

4. **Kloakkir í Syðradali og Norðadali**
Henda ætlanin er at samla kloakkirnar ávikavist í Syðradali og Norðadali í skipaða leiðing fyri at lúka krøvunum frá Umhvørvisstovuni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta:
1) kr. 300.000,- til projektering av kloakkum í Kollafirði
2) kr. 150.000,- til porjektering av kloakkum í Kaldbak og Kaldbaksbotni
3) kr. 150.000,- til projektering av kloakkum við Bakkagøtu og á Argjabooða á Argjum
4) kr. 100.000,- til projektering av kloakkum í Syðradali og Norðadali
ella samanlagt kr. 700.000,- til tey 4 omanfyri standandi arbeiði av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**54/13** **2000-1326 TíH**

**Mál viðv. nýggjum kirkjugarði í Kaldbak**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Áheitan frá Pálli Petersen, býráðslimi, dagfest 1. mai 2000, um at nýggjur kirkjugarður verður gjørdur í Kaldbak.

**Kaldbaksnevndin 8. mai 2000:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til ummælis.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mai 2000:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 5. juni 2000:** Umsitingin ger uppskot um økjan av verandi kirkjugarði at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt tvey uppskot og kostnaðarmeting.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2000:** Samtykt at senda málið til hoyring í kaldbaksnevndini.

**Kaldbaksnevndin 21. september 2000:** Uppskotið til nýggjan kirkjugarð, ið varð framlagt, helt nevndin verða í so umfatandi.

Samtykt at biðja um uppskot til minni víðkan av kirkjugarðinum vestureftir at leggja fyri nevndina aftur.

**Kaldbaksnevndin 22. november 2006:** Nevndin heitir á byggi- og býarskipanarnevndina um at fyrireika arbeiðið at víðka kirkjugarðin í Kaldbak, tí at einki pláss er eftir.

Sí annars fundarfrásøgn frá borgarafundinum 23. oktober 2006, j. nr. 2005-2969.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir ynskja at kommunan setur ein arkitekt at tekna eitt uppskot til nýggjan kirkjugarð, har atlit verða tikin til, at kirkjan er friðað og kirkjugarðurin skal fella so væl saman við kirkjuni sum gjørligt.

**Kaldbaksnevndin 13. mai 2008:** Málið hastar, bara nøkur fá pláss eru eftir í verandi kirkjugarði.

Eingin peningur er settur av til arbeiðið. Ynskiligt er, at kommunan tekur upp samskiftið við kirkjuráðið.

**Kaldbaksnevndin 17. mars 2009:** Tóri í Hoyvík kunnaði um málið og vísti á møguliga staðseting.

- Umsitingin kunnar um málið.

**Tekniska nevnd 16. juni 2009:** Tóri í Hoyvík kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Arkitektlesandi og býarskipanardeildin hava saman við lendisdeildini gjørt uppskot til staðseting og skipan av kirkjugarðinum í Kaldbak. Uppskotið fevnir við verandi innrætting um 186 gravpláss.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og býararkitekturin heitir á nevndina at taka undir við staðsetingini og senda málið til fíggjarnevndina, at útvega neyðugt lendi og fígging til at gera kirkjugarðinum fyri.

**Kaldbaksnevndin 27. januar 2010:** Staðbundnu limirnir ynskja kunning um, hvussu langt málið er komið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Nevndin samtykti at umsitingin gerð eina kostnaðarmeting til komandi fund.

**Kaldbaksnevndin 19. mai 2010:** Tóri í Hoyvík kunnaði um ætlanina við nýggjum kirkjugarði.

**Kaldbaksnevndin 23. februar 2011:** Tóri í Hoyvík kunnaði um ætlanina.

**Kaldbaksnevndin 18. mai 2011:** Kunnað varð um málið. Tilmæli er at keypa størri øki enn bert til kirkjugarðin. Borgarstjórin beinir málið í fíggjarnevndina.

**Kaldbaksnevndin 23. november 2011:** Borgarstjórin greiddi frá málinum og heitir á løgdeildina at avgreiða málið sum skjótast.

**Kaldbaksnevndin 22. februar 2012:** Matrikuleringsviðurskiftini eru avgreidd av Umhvørvisstovuni. Væntandi verða øll formlig viðurskifti avgreidd innan fyri 2-4 vikur, so arbeiðið kann fara í gongd.

**Kaldbaksnevndin 29. mai 2012:** Kunnað varð um málið. Borgarstjórin beinir málið í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Staðseting er gjørd hvar kirkjugarðurin skal verða, byggisamtyktin broytt og lendið fingið til vega frá Búnaðargrunninum. Á fundi í Kaldbaksnevndini 29. mai 2012, varð umrøtt at samskipa arbeiðið við kirkjugarðinum við ætlaðu skipan av busssteðgiplássinum og umlegging av Krossgøtu við skúlan í Kaldbak. Mett var, at tað er skilagott um nøgdir av avgrevstartilfari og mold kann endurnýtast á staðnum.
Býarskipanar- og lendisdeildin gera tilfars- og nøgdarmetingar fyri kirkjugarðin og seta seg í samband við teknisku deild um at samskipa arbeiðini á besta hátt.
Peningur at gera projektuppskot er tøkur á projektkonto L65003.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at tikið verður undir við staðsetingini, at gera projektuppskot og at taka upp samráð við teknisku deild um samskipan av uppgávunum. Prosjektuppskot við kostnaðarmeting at leggja fyri til fíggjarætlan 2013.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 14. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum

**Keyp av lendi til nýggjan kirkjugarð**
Búnaðarstovan bjóðar kommununi at keypa 6.521 ferm. av matr. 22a og 49a í Kaldbak.
Keypsprísurin er íalt kr. 798.758,80. Kr. 766.000 eru tøkar á íløguætlanini til kirkjugarð í Kaldbak. Sostatt resta í kr. 33.000.

**Projektering av nýggjum kirkjugarði.**
Projekteringin av nýggjum kirkjugarði er mett at kosta kr. 200.000, og mettur kostnaður 4. mill. at gera nýggjan kirkjugarð.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til, at kommunan ognar sær lendi til nýggjan kirkjugarð, og at játta kr. 233.000 av framfluttum íløgukarminum 2011 á 6575 kirkjugarðar og at senda málið í fíggjarnevndina til avgreiðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Kaldbaksnevndin 12. september 2012:** Tekniski stjórin kunnaði um, at avtala við Búnaðarstovuna um lendi til nýggjan kirkjugarð er komin upp á pláss, og at tað sostatt nú er klárt at fara víðari við fyrireikingunum til gerð av nýggjum kirkjugarði.

Borgarstjórin kunnaði um, at tað í løtuni verður arbeitt við íløguætlan fyri 2013, har játtan til kirkjugarðar verður viðgjørd.

**Kaldbaksnevndin 3. desember 2012:** Tekningar lagdar fram. Endaligt uppskot fyriliggur 20. februar at taka støðu til.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir spyrja hvussu gongur við arbeiðinum.

**Kaldbaksnevndin 20. februar 2013:** Býargartnarin kunnaði um málið og at arbeitt verður við at gera projektið klárt til útbjóðing. Málið kemur fyri á fyrstkomandi fundi í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Prosjektuppskot frá 20. februar 2013 og kostnaðarmeting verður lagt fyri nevndina til samtyktar, við umbøn um at loyvt verður at bjóða arbeiðið út.

**Fíggjarviðurskifti:**
Verkætlanin verður mett at kosta 2,5 mió. Settar av til kirkjugarðar í 2013 eru 3. mió.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býargartnarin mæla til at játta kr. 3. mió. av íløgum fyri 2013 fyri kirkjugarðar, §6, kto. 6575, og at beina málið, um fíggjarnevndina, til býráðið. Eisini verður mælt til at bjóða arbeiðið út í undirhondsútboð, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

Helena Dam á Neystabø og Bogi Andreasen vóru ikki við til hetta málið

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein var ikki við til viðgerðina av máli nr. 55/13

**55/13** **<u>2011-2948</u>**

**<u>Umsókn frá Eigarafeløgunum á Berjabrekku</u>**

Eigarafeløgini á Berjabrekku heita á kommununa um at samtykkja í veðseting fyri láni stórum kr. 550.000,00 í Eik banka við veð í hitamiðstøðini á Berjabrekku.

Hitamiðstøðin hevur fingið játtað eitt lán í Eik banka uppá kr. 550.000,00 ímóti 1. veðrætti kr. 600.000,00 í bygninginum Hitamiðstøðin á Berjabrekku.

Trupulleikin er, at Tórshavnar kommuna er tinglýstur eigari av matr. nr. 1464b, sum hitamiðstøðin er bygd á.

Vísandi til at eingin leigusáttmáli er millum kommununa og eigarafeløgini á Berjabrekku (Hitamiðstøðina), ber ikki til hjá Eigarafeløgunum at veðseta hitamiðstøðina fyri láninum í Eik banka.

**Yvirlit yvir matriklini á Berjabrekku:**
Matr. nr. 1464b. Hitamiðstøðin. Vídd uml. 590 m² við ástandandi hitamiðstøð uml. 70 m².
Matr. nr. 1464c. Berjabrekka 1. Vídd 13.085 m². 71 íbúðir eru frámatrikuleraðar.
Matr. nr. 1464d. Berjabrekka 2. Vídd 6.310 m². 32 íbúðir eru frámatrikuleraðar.

**Ymiskt:**
Sambært § 15 í viðtøkunum fyri Eigarafelagið á Berjabrekku framgongur, at hitamiðstøðin er felags ogn, og er raksturin av henni fyri felags rokning. Hvør einstakur eigari rindar aconto eitt av nevndini ásett gjald, smb. § 13.

Eigarafelagið hevur øll árini, síðani íbúðirnar vóru bygdar í 80unum, arbeitt sum um hitamiðstøðin er eigarafelagsins ogn, og hevur eigarafelagið havt viðlíkahaldið av hitamiðstøðini.

Talan er um gamalt mál frá 1980unum, men sambært samrøðu við Ronald Poulsen, sum hevði eftirlitið um hendi fyri kommununa, var hitamiðstøðin partur av verkætlanini, og tískil er hon eisini goldin av íbúgvunum.

Umsitingin hevur skjøl, sum undirbyggja, at Hitamiðstøðin var partur av byggirokniskapinum.

**Tilmæli:**
Vísandi til:

- at Hitamiðstøðin sambært viðtøkunum er felagsogn hjá íbúgvunum á Berjabrekku.
- at Eigarafelagið hevur havt rakstur og viðlíkahaldið av hitamiðstøðini um hendi, síðani hitamiðstøðin varð bygd í 1980unum
- at Eigarafelagið øll árini hevur arbeitt, sum um hitamiðstøðin var ogn hjá íbúgvunum á Berjabrekku,

Mæla leiðarin á starvsfólka- og løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin til at skriva leigusáttmála við íbúgvarnar á Berjabrekku/Eigarafelagið á Berjabrekku um leigu av undirlendinum undir hitamiðstøðini.

Leigusáttmálin er treytaður av góðkenning frá Innlendismálaráðnum og av, at Eigarafelagið kann góðtaka treytirnar í sáttmálanum.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tinglýsingin hevur boðað frá, at tað er ikki møguligt at tinglýsa leigusáttmála millum Tórshavnar kommunu og eigaran av Hitamiðstøðini.

Orsøkin er at matrikul nr. 1464b, umfatar sjálvt lendið og alt sum hará stendur, herundir ástandandi hitamiðstøðina.

Trupult er at finna út av hví undirlendið undir hitamiðstøðini er ogn hjá kommununi, men vóru sera nógvir trupulleikar í samband við bygging av íbúðunum á Berjabrekku.

Mett verður at talan er um eitt forsømilsi, at matrikulin ikki er tinglýstur, til íbúgvarnar.

Grundøkið er uml. 590 $m^2$, og er hitamiðstøðin uml. 70 $m^2$.

Tilber at frámatrikulerað økið har hitamiðstøðin liggur, talan er um umleið 70 – 90 m2 og handa eigarafelagnum henda partin, meðan restin umleið. 500 $m^2$, framhaldandi verður kommunal ogn.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at handa eigarafelagnum/íbúgvunum í Berjabrekku undirlendið undir hitamiðstøðini.

Eigarafelagið rindar allar útreiðslur viðvíkjandi matrikuleringini.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**56/13** **2011-2166 TÍH/BJ**

**Kampingplássið Yviri við Strond**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Útvegan og uppsetan av nýggjum bygningum til kampingvirksemi og tænastur til ferðafólk.

Verandi kampingpláss varð sett á stovn í 1980-81. Kampingskúrarnir til W.C. og baðirúm. Hetta vórðu byggiskúrar sum byggifelagið Guttesen og Staksberg tá bygdu. Síðani er bygdur ein skúrur aftrat til konufólk og køk, matgerð og matstovu. Húsini ella skúrarnir eru nú millum 30 og 20 ára gamlir, og hóast gott viðlíkahald eru teir ikki tíðarhóskandi og krevja størri og størri umvælingar. Ikki er sørt at vitjandi úr útlondum viðmerkja, at umstøðurnar eru vánaligar.

Tórshavnar kommuna eigur økið matr. nr. 672a, samlað vídd á matrikli 27505 m²
Byggisamtykt D1.

Tekningar eru við fasadum og innrætting hevur býararkitekturin latið gera. Bygningurin er staðsettur á sama øki sum verandi. Tað er tað besta, havandi friðingarmynduleikan í huga. Ætlan er at keypa lidnar pavilliongir. Nýggjur rottangi skal setast upp og bindast í skipaða kloakk í vegnum.

Í fíggjarætlanini fyri 2012 eru avsettar kr. 3,0 mió á kto 6275 Fríðkan av kommununi, harav umsitingin í sambandi við framløguna av fíggjarætlanaruppskotinum mælti til at nýta kr. 1,0 mió til nýggjar bygningar á staðnum. Ein neyvari meting sigur tó, at kostnaðurin fyri nýggjar bygningar og kloakk-/rottangaviðurskifti, væntast at kosta uml. 1,5 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini at taka undir við uppskotinum, og at játta kr. 1,5 mió av kto 6275 til nýggjar bygningar og broyting av rottanga v.m. á kampingplássinum Yviri við Strond, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jògvan Arge, Elin Lindenskov og Sjúrður Olsen, mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**
Vísandi til at kampingplássið liggur í D1, hevur ivamál stungið seg upp, um loyvi at gera broytingar og byggja nýtt. Verandi bygningar eru 30 og 20 ára gamlir og í ringum standi. Byggiloyvi krevst til dagføring av krøvum, plásskrøv, rýmingarleiðum, avlamisviðurskiftum, atkomu fyri rullistólabrúkarum v.m. Neyðugt verður at ríva verandi hús niður og at byggja nýtt. ì hesum sambandi verður samlaða húsavíddin 140 m² móti verandi 72 m².

Arbeitt hevur verið við at skipa eitt kampingpláss á øðrum staði, men er henda íløgan so stór, at einki verður gjørt fyribils. Tí verður søkt um at fáa fyribilsloyvi og frávik frá byggisamtyktini til at byggja nýtt. Bygt verður sambært hjáløgdu tekningum.

Væntað verður, at tað kann nøkta tørvin í eitt 10 ára skeið til 2023.
Loyvi krevst frá náttúrufriðingarmyndugleikunum um bygging nær sjóvarmálan.

Tá nýggjur skúrur varð bygdur aftrat i 1986, vóru loyvi fingin til vega frá Náttúrufriðingarnevndini og frá Yvirfriðingarnevndini dagfest 22. august 1986. Býráðsmál nr. 34/7 1981.

Umsitingin hevur eisini arbeitt víðari við tekningum av byggingini, og hevur gjørt nakrar broytingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla nevndini til at góðkenna fyriliggjandi prosjekt, og at játta byggiloyvi sum frávik, sambært innsendu tekningum, treytað av góðkenning frá friðingarmyndugleikunum.

Somuleiðis verður mælt til at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út í innbodnari arbeiðstøku.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum treytað av at bygningurin verður fluttur minst 2,5 m frá vegnum.

**Ískoyti:**
Arbeiðstakararnir Djóni í Geil Johansen, timburmeistari og Valbjørn Dalsgarð, timburmeistari eru bodnir til undirhondsboð. Tilboðini verða handað Tórshavnar kommunu tann 25. februar 2013, og verða løgd fram til nevndarfundin.

Tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Friðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu hevur á fundi hin 7. jan. 2013 givið játtandi loyvi til byggingina, treytað av góðkenning frá Yvirfriðingarnevndini.

Yvirfriðingarnevndin hevur á fundi 19. febr. 2013 staðfest avgerðina hjá Friðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu.

Byggiloyvi er síðani útskrivað hin 25. febr. 2013.

Arbeiðstakararnir Djóni í Geil Johansen timburmeistari og Valbjørn Dalsgarð timburmeistari vóru bodnir at lata inn undirhondsboð. Tilboðini vórðu handað Tórshavnar Kommunu tann 25. februar 2013.

Tilboðið frá Djóna í Geil Johansen er áljóðandi: 2,098,737,00 kr uttan mvg.

Tilboðið frá Valbjørn Dalsgarð er áljóðandi: 3.833.687,00 kr uttan mvg.

Um tikið verður av lægsta tilboðnum, verður samlaði kostnaðurin fyri Kampingplássið Yviri við Strond áljóðandi: **2.831.983,00 kr**, íroknað óvæntað, eftirlit, og 6,25% í mvg.

Avsettar eru kr. 1,5 mió. á fíggjarætlanini fyri 2012 til verkætlanina. Írestandi fíggjartørvurin er sostatt áljóðandi: **1.331.983,00 kr.**

Spurningurin um hvørjir møguleikar eru at útvega írestandi fíggingina er viðgjørdur av stjórnini, saman við Fíggjardeildini, og verður víst á henda møguleika:

| | | |
|---|---|---|
| FÆ 2012 til kampingpláss | konto 6275, L62005 | 1.500.000 |
| Flyting frá FÆ2012 Boðanesgjógv mentanarøki | konto 5375 | 1.000.000 |
| Flyting frá FÆ2012 Skálatrøð framtíðarætlan | konto 5375 | 340.000 |
| | | **2.840.000** |

Viðv. tíðarætlan hava báðir tilboðsgevarar upplýst, at byggingin væntast at taka umleið 4 mánaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at spurningurin um fígging, herundir írestandi fíggingina, verður tikin upp til politiska viðgerð, og at málið verður beint til mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø, mælir frá at finna írestandi fíggingina á mentanarøkinum.

**Ískoyti:**
Stjórnin hevur kannað møguleikarnar nærri, fyri fígging av írestandi fíggjartørvinum, eftir at staðfest er, at konto 6275 hevur eitt avlop á kr. 800.000.

Á hesum grundarlagið mælir stjórnin til, at samlað fíggingin fyri kampingplássið verður sett soleiðis saman, at tekniska økið fíggjar kr. 2.300.000, meðan restin – kr. 540.000 verður fíggjað við flyting av óbrúktum játtanum á konto 5375:

| | | |
|---|---|---|
| FÆ 2012 til kampingpláss | konto 6275, L62005 | 1.500.000 |
| Framflyting av avlopi frá FÆ2012 Friðkan av býnum | konto 6275 | 800.000 |
| Flyting frá FÆ2012 Boðanesgjógv mentanarøki | konto 5375 | 200.000 |
| Flyting frá FÆ2012 Skálatrøð framtíðarætlan | konto 5375 | 340.000 |
| | | **2.840.000** |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til, at fíggja samlaða kostnaðin fyri kampingplássið Yviri við Strond sambært omanfyri standandi uppskotið.

**Tekniska nevnd 13. mars 2013**
Limirnir hava umvegis teldupost hesa støðu til tilmæli:
Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø, tekur undir vid tilmælinum, treytað av, at peningurin verður fluttur aftur til mentamálaøkið, tá tørvur verður á tí.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, mælir til, at málið kemur fyri á eyka fundi í teknisku nevnd 18. mars 2013.

**Mentamálanevndin 13. mars 2013**
Limirnir hava umvegis teldupost hesa støðu til tilmæli:
Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Jógvan Arge, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø, tekur undir vid tilmælinum, treytað av, at peningurin verður fluttur aftur til mentamalaøkið, tá tørvur verður á tí.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í mentamálanendini og teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**57/13** **2013-0730**

**Hitastova/dagtilhald til heimleys**

Tørvur er á einum skipaðum tilhaldi, ofta nevnt hitastova, til heimleys í dagtímunum. Frelsunarherurin og Blái krossur hava bútilboð til heimleys við stuðli úr landskassanum sbrt. forsorgarlógini, men hetta er í høvuðsheitum eitt tilboð um náttarvist. Í dagtímunum halda tey heimleysu í stóran mun til úti á gøtunum.

Hitastovan/dagtilhaldið er tilboð, sum tey heimleysu frítt kunnu brúka, og har tey kunnu fáa nærveru og umsorgan undir skipaðum viðurskiftum. Í fíggjarætlanini fyri 2013 konta 2746 Tilboð til heimleys eru kr. 500.000 settar av til tilhald til heimleys.

Ætlanin hevur verið at gera avtalu við hjálparfelagsskap at standa fyri hitastovuni. Í 2012 vendi Frelsunarherurin sær til kommununa við ætlan um at byggja Herbergið á Dalavegnum út til eisini at fevna um dagtilhald til tey heimleysu. Hetta samsvarar væl við nýtslumøguleikarnar og virksemið, sum Herbergið frammanundan hevur.

Tilhaldið fer at hava opið frá kl. 11 til 18 hvønn dag, har tey heimleysu umframt mat eisini hava høvi til at taka lut í smærri ítrivum. Mett verður, at starvsfólkatørvurin svarar til 2.255 tímar árliga, umframt reingerð, fyrireiking og annar rakstur. Samlaðu rakstrarútreiðslurnar í inniverandi ári íroknað uppstarstútreiðslur vera uml. kr. 650.000.

Frelsunarherurin hevur fingið byggiloyvi. Frelsunarherurin rindar allan kostnaðin fyri byggingina, men søkt verður um stuðul til raksturin.

Umsitingin hevur saman við Frelsunarherinum gjørt uppskot til avtalu um stuðul til rakstur av hitastovu/dagtilhaldi til heimleys í Tórshavnar kommunu. Sambært avtaluuppskotinum hevur Frelsunarherurin ábyrgd av øllum viðurskiftum í sambandi við hitastovuna/dagtilhaldið, og at kommunan letur stuðul til endamálið treytað av játtan í fíggjarætlanini. Skipast skal eisini fyri árligum felags fundi millum kommunu, Frelsunarherin og møguliga aðrar viðkomandi partar at umrøða skipanina, møguligan tillagingartørv v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at samtykkja avtalu við Frelsunarherin um stuðul til rakstur av hitastovu/dagtilhaldi til heimleys í Tórshavnar kommunu, og at játta kr. 500.000 í rakstrarstuðli fyri 2013 av kontu 2746 Tilboð til heimleys.

**Trivnaðarnevndin 12. mars 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við trivnaðarnevndini.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

## FUNDUR LOKIN KL. 19:15

## GERÐABÓKIN GÓÐKEND:

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Elin Lindenskov | Bjørghild Djurhuus |
| Helena Dam á Neystabø | Sigrún Mohr | Tróndur Sigurdsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andresen | Annfinn Brekkstein |
| Jan Christiansen | Jákup Dam | Andrea Heindriksdóttir |
| | Heðin Mortensen | |